# Tvøroyrar Kirkja 100 ár

**Kristi Himmalferðardag 2008 fylti Tvøroyrar Kirkja 100 ár, og gjørt verður burturúr 100 ára haldinum. Alf Stefferud úr Noreg er komin at vitja í hesum sambandi, tí hann hevur serligan áhuga í hesi kirkjuni, sum er gjørd í Noreg**

KIRKJA 100 ÁR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Tvøroyrar Kirkja er 100 ára gomul og er serstøk. Stórur træbyggningur, og handverkið verður í dag mett sum listahandverk, og slík byggiætlan verður neyvan endurtikin í dag*

*Mynd: Dagfinn Olsen*



*Alf Stefferud er úr Strømmen í Noregi, har kirkjan á Tvøroyri er gjørd. Hann hevur serstakan áhuga í tí søguliga í hesum sambandi, og vitjar á Tvøroyri, nú kirkjan er 100 ár*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

Tvøroyrar Kirkja verður í hesum døgum hátíðarhildin, tí kirkjan er 100 ár. Nógv verður gjørt burturúr, men forvitnisligt er, at ein maður úr Noreg er komin hendanvegin at vitja, tí hann hevur heilt serligan áhuga í kirkjuni.

Tvøroyrar Kirkja er stór trækirkja. Tað vóru sonevndu Mortensensmenninir á Tvøroyri, ið lótu kirkjuna. Hetta var í framburðstíðum á Tvøroyri, ið var eitt hitt skjótast vaksandi stað í landinum tá. Kirkjan er serstøk, tí hon er prógv um handverk, ið neyvan sæst nakrastaðni í dag.

Kirkjan er úr Noregi, gjørd á Strømmen Trævarefabrik. Og júst í Strømmen er Alf Stefferud eitt slag av økisgranskara, ið hevur serstakan áhuga í tí søguliga. Hóast hann ger hetta av áhuga, so er hann sera íðin, og fær væl burturúr, og fleiri bøkur hevur hann latið skrivað, millum annað um Strømmen Trævarefabrik, og javnan heldur hann fyrilestrar um júst hetta.

Alf er á ferð í Suðuroynni, saman við konu síni. Hann hevur havt samband við Einar Larsen, ið stendur fyri Fornminnisfelagnum á Tvøroyri. Og tá høvi nú var at koma til Føroya í samband við, at krikjan á Tvøroyri gjørdist 100 ár, so tók Alf møguleikan at síggja kirkjuna í veruleikanum. Hesa kirkju, sum hann hevur skrivað um í samband við søguna um træverkið í Strømmen.

Alf greiðir frá, at síðani 1985 hevur handilsmiðdepil verið, har træverkið áður helt til. Eitt skifti var eisini stálverkstað í Strømmen. Hann veit nógv um søguna, og dugir hana uttanat og er fryntligur og prátingarsamur, tá vit hitta hann í Vági, har hann og Einar Larsen steðga á eitt bil fyri at hitta blaðmannin, meðan teir eru á ferð kring Suðuroynna.

## Grivin í Havn

Hann greiðir frá, at norska træfyritøkan seldi og bygdi hús kring allan heim. Á Tvøroyri eru fleiri hús frá norsku fyritøkuni, umframt kirkjuna, og í 1905 bygdi fyritøkan Telegrafstøðina í Havn. Í hesum sambandi veit Alf forvitnisliga søgu um ein av montørunum, Hans Kristian Gulbrandsen, sum ikki vendi heimaftur til Noregs. Hann doyði nevniliga í Føroyum. Hann fekk tyfus og doyði í 1906 og liggur hann grivin í Havn, har grøvin enn sæst.

Alf Stefferud er virkin, hóast hann nú er farin um pensjónsaldur. Umframt at halda fyrilestrar um ymiskt søguligt í Strømmen økinum, so er hann eisin í felagsskapi, ið hevur til endamáls at endurskapa nakað av tí farna, ið hevur við ánna og virksemið har at gera, t.d. at endurbyggja vatnmyllur og onnur tól, ið vórðu nýtt í framleiðsluni fyrr. Og slíkar ætlanir kosta pening, men her hevur Alf verið góður stuðul við bókaskriving síni, og enn ein bók kemur frá hansara hondum í heyst, og vinningurin fer beinleiðis til ætlanirnar hjá felagsskapinum.

Alf var sera hugtikin, tá hann mikukvøldið kom við Smyrli inn á Tvøroyri, og sá Tvøroyrar Kirkju. Hesa kirkju, sum hann hevur skrivað um, og sæð upprunatekningarnar av. Alt tilfar í bókini um Strømmen Trævarefabrik liggur goymt á norska landsskjalasavninum, eisini upprunatekningarnar til norsku kirkjuna, sum nú hevur staðið á Tvøroyri í 100 ár.

## Hátíðarhald

Gjørt verður burtuur, nú kirkjan á Tvøroyri hevur 100 ár á baki. Sálvur 100 ára dagurin er settur at vera Kristihimmalferðardag.

Byrjað var við guðstænastu Kristi Himmalferðardag klokkan 11:00, har Jógvan Friðriksson, bispur, prædikaði og Ljómur sang. Klokkan 14:00 var borðhald fyri innbodnum á Hotel Tvøroyri. Myndaframsýning lat upp klokkan 15:00 í skúlahøllini í Trongisvági og alment borðhald var í ítróttarhøllini í Trongisvági klokkan 18:00. Har var Christian Majdal, fyrrv. formaður í danska Fólkatinginum, gestarøðari. Pápi hansara var prestur á Tvøroyri og Christian er føddur har og livdi fyrstu barnaár síni á Tvøroyri.

Fríggjadagin er myndaframsýningin opin og klokkan 20:00 er gospelkonsert í Tvøroyrar Kirkju, har m.o. Guðrun Sólja Jacobsen, Jonhild A. Nielsen og Sólfríð Bech og Jens Lisberg luttaka.

Leygardagin heldur myndaframsýningin fram klokkan 15. Klokkan 14:30 er matiné í kirkjuni við Tvøroyrar Hornorkestri. Klokkan 15 er fyrilestur í kirkjuni, har Jákup Reinert Hansen tosar um Jákup Dahl og sálmayrking hansara. Klokkan 19:00 er konsert í Tvøroyrar Kirkju.

Sunnudagin er barnaguðstænasta klokkan 14:00, har Barnakórið í Glyvra Kirkju syngur. Myndaframsýningin letur upp klokkan 14:00.



*Jónsvein Bech, prestur, avmyndaður inni í Tvøroyrar Kirkju*

*Mynd: Dagfinn Olsen*



*Mynd av grøvini hjá norska montørinum, sum var við til at byggja Telegrafstøðina í Havn í 1905. Hann doyði av tyfus í 1906. Á krossinum stendur; Hans Kristian Gulbrandsen, født i Norge 29. november 1866, død i Thorshavn 25. februar 1906. Ein prestakona lovaði at passa grøvina, so longi hon livdi*